

*Høgni Lisberg umboðar Føroyar á norðulendskum tónleikaverkstaði (mynd: Símun Jóannesarson)*

## Høgni hevur nógv jørn í eldinum

**Høgni Lisberg hevur úr at gera um mánaðarskiftið mai/juni. Hann luttekur á tveimum festivalum, eini stórari danskari útvarpskonsert og einum norðurlendskum tónleika verkstaði, alt innan fyri seks dagar**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Asfalt kunngjørdi herfyri, at Høgni Lisberg verður millum nøvnini á stóra tiltakinum í Tórsgøtu fyrsta vikuskiftið í juni, nú almannakunngerð Spot Festivalurin í Århus eisini, at Høgni luttekur har. Høgni fer á tann sokallaða singer/-songwriter pallin á Spot Festivalinum. Hetta er júst sami pallur, sum Teitur framførdi á, tá hann fekk fyrstu sambondini, ið seinni gjørdust til ein altjóða útgávusáttmála.

Spot festivalurin er í døgunum 1. til 3 juni og asfalt er 2. og 3, so her er talan um tvær konsertir á tveimum festivalum í tveimum ymiskum londum innan fyri í mesta lagi 3 dagar. Men hetta verður bert endin á eini sera hendingaríkari viku fyri Høgna Lisberg.

### Tónleikaverkstaður

Í døgunum undan Spot festivalin luttekur Høgni Lisberg í einum norðurlendskum singer/songwriter verkstaðið, saman við 11 ørðum norðurlendskum listafólkum innan hesa tónleikagrein. Tað er Christian Ulf-Hansen, umboðsmaður hjá Teitur, ið verður verkstaðsleiðari. Hann heldur somuleiðis fyrilestrar um tónleika ídnaðin. Verkstaðurin verður á Vestbirk Højskole beint við Århus, í døgunum 29. mai til 1. juni. 31. mai spæla tey 12 listafólkini eina konsert, ið Danmarks Radio væntandi fer at senda.

Somuleiðis er ætlanin, at eitt sjónvarpslið skal vera við teimum hesar dagarnar, og gera eina dokumentarsending um sangskriving.

Higartil eru fýra danir: Lars Skjærbæk, Nicolai Funch, Pernille Gunvad og Rene Schmidt, tveir norðmenn: Johanne Ballovare og Magnus Eliassen, ein grønlendari: Simon Lynge og føroyski Høgni Lisberg váttaði á tónleikaverkstaðnum.

### Ein roynd at skapa sambond

Tað er Roar Amundsen, ið hevur tikið stig til henda tónleikaverkstað í samstarvi við Dansk Rock Samråd. Endamálið er lutvíst at skapa sambond millum listafólk innan hesa tónleikagrein úr ymisku norðurlendsku londunum, geva teimum íblástur, og brynja ungu listafólkini til eitt lív sum yrkislistafólk. Men tónleikaverkstaðurin kann væntandi eisini kunna vanliga fólkið um hesa tónleikagrein.

# AME Reykjavík: Føroyskur tónleikur ger innrás



*Mynd: Marius vann GBOB og vann nógvu hjørtu í London finaluni, nú fer bólkurin til Íslands at vinna hjørtu*

**Nú fáa íslendingar høvið at uppliva, at føroyskur tónleikur er annað enn Georg, James, Eivør, Týr og 200, tá seks føroyskir bólkar fara á pall í best umtókta spælistaðnum í Reykjavík**

ÚTFLUTNINGUR

*Orð/mynd: Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið 22. april skipa Menningarstovan, TUTL og Norðurlandahúsið fyri fyri stórari konsert við 6 føroyskum bólkum einum íslendskum bólki í vælumtókta konsert- og dansistaðnum NASA í miðbýnum í Reykjavík.

### Fjórða AME tiltakið

Tiltakið verður nevnt "AME-Reykjavík" og hevur tilendamáls at skapa áhugað fyri føroyskum tónleiki í Íslandi. Hetta er fjórða AME tiltakið, ið Norðurlandahúsið skipar fyri, tvey hava verið í VEGA í Keypmannahavn í 2004 og 2005, meðan Norðurlandahúsið í Føroyum var karmur um tiltakið í apríl í fjør. Aftur hesaferð er Altantic Airways við sum stuðul á tiltakinum.

### Nakað av tí besta

Luttakandi bólkarnir á AME Reykjavík eru nakað av tí besta, ið føroyski tónleikaheimurin hevur at bjóða innan rokk og popp. Høgni Lisberg, Lena, Deja Vu, Makrel, Marius og Gestir . Harumframt luttekur íslendski bólkurin Dikta

### Frá Ssa Ssa Sa Sa til Musclemanblað

Føroyskur tónleikur hevur vunnið alsamt størri lurtaraskara í Íslandi seinnu árini, har nýggjari bólkar sum Týr, 200 og serliga Eivør hava fingið nógvar áhoyrar í bróðurtjóðini í vestri. Bæði Týr og Eivør hava selt nógvar fløgur og havt ovastu rók á íslendsku hittlistunum, meðan 200 og teirra Musclemanblað mundu koppað Iceland Airwaves festivalin í fjør.

Men søguliga hevur tónlistarliga tilknýtið altíð verið stórt millum tjóðirnar. Nevnast kunnu James Olsen og risa stjørnan í 80'unum George eystan Á, ið næstan kundi ganga á vatninum í Íslandi, ið øllum førum á Vatnajøklinum.

### Áhugaverdur marknaður

Fyri føroyskari tónleikabólkar er íslendski marknaðurin sera áhugaverdur, tí hóast hann ikki er stórur, so kann hetta lætt tví- ella trý falda søluna av eini føroyskari útgávu. Hetta merkir í veruleikanum munin á undirskotið og yvirskotið av eini fløguútgávu.

Í Íslandi hava miðlarnir víst AME Reykjavík stóran ans. Bæði Ríkisútvarpið, tonlist.is, visitreykjavik.is og aðrir miðlar hava skrivað um tiltakið á sínum heimasíðum, og sjónvarp og útvarp fyrireika innsløg frá innrásini.

Størri útboð av føroyskum tónleiki

Atgongumerkini kosta 1500 íslendskar krónur og kunnu keypast í Skifuni á www.midi.is

Dyrnar lata upp klokkan 20.30 og konsertin byrjar klokkan 21.00. Í sambandi við konsertina er útboðið av føroyskum tónleiki í Skifuni munandi størri í apríl.